lívdin
- í lívd hins hægsta
Ein Viðkomandi Samkoma
November 2006




## Ein faldari ger tað einfaldari!

Hóast vit í Lívdini verða væl kunnað um, hvat fer fram í samkomuni – bæði á møtunum, á heimasíðuni og við telduposti, halda vit, at tørvur er á einum slíkum faldara sum hesum, serliga tí at tænastur, tiltøk og lýsingar eru so nógv í tali, at ikki er so lætt hjá øllum at halda skil á, nær, hvar og hvat klokkan alt hetta ymiska fer fram.

Endamálið við faldaranum er, at tað skal vera einfaldari hjá øllum í samkomuni at fylgja við tí, ið fer fram, og øll, sum skipa fyri ymiskum í samkomuni, eru vælkomin at brúka faldaran til at lýsa síni tiltøk.

Vit halda eisini, at faldarin tænir endamálinum, at Lívdin skal vera ein viðkomandi samkoma, tí hava vit tíðindi frá trúboðarum og onnur tíðindi um fólk í samkomuni, sum t.d. hava rundar føðingardagar, giftast, fáa børn ella fara av landinum í longri ella styttri tíðarskeið. Eisini verður kunnað um nýggja samkomubygningin. Skráin fyri møtini hvønn mánað verður fastur táttur á baksíðuni á faldaranum.

Vit vóna, at samkoman tekur væl undir við faldaranum, og at fólk siga okkum frá, um tey hava okkurt, sum tey halda átti at komið í blaðið.

Vón okkara er, at faldarin er komin fyri at vera. Tað er ikki ókeypis at gera ein slíkan faldara, tí eru fólk vælkomin at stuðla við at seta pening inn á kontu hjá Lívdini í Føroya Sparikassa: 9181-132.564-9, merkt: Faldarin.



## Kunning er alneyðug

Samkomulívið í Lívdini er samansett av so nógvum ymsum virksemi, at ilt er at fylgja við øllum. Her eru møtir, sunnudagsskúli, ungdómsmøtir og onnur tiltøk fyri bæði børn og vaksin. Tað eru rundir føðingardagar, silvur- og gullbrúdleyp. Tað eru børn, sum verða fødd, og ung, sum flyta av landinum at nema sær útbúgving. Tað eru útisetar, sum vitja aftur á klettunum o.s.fr.

Skulu vit øll fylgja so toluliga væl við, er alneyðugt við góðari kunning. Hetta hava vit roynt at gera gjøgnum lýsingar á møtunum hvønn sunnudag, gjøgnum heimasíðuna og gjøgnum t-postarnar “Innanhýsis lýsingar”. Og nú verður roynt at betra um kunningina við hesum faldara.

Gerið tykkum sjálvum og samkomuni tann beina at lesa faldaran ígjøgnum og eisini at siga frá tí, sum kundi verið áhugavert at sett í faldaran.

*Absalon*

# Vinir í Lívdini



## Aleksandra og Rani gift

Í juni giftust Aleksandra Melo Neshamar úr Hoyvík og Rani Andrasson Skaalum úr Havn.

Tey vórðu borgarliga vígd av Heðini Mortensen borgarstjóra týsdagin 20. juni á kommunuskrivstovuni í Havn. Sunnudagin 25. juni vórðu tey vælsignað av Tróndi Skaalum í leigaðum hølum.

Tað hevði nógv at siga fyri Rana og Aleksandru, at tað júst var Tróndur, beiggi Rana, sum vígdi tey andaliga, um til ber at siga so. Hann hevur havt stóran týdning fyri tey bæði og hevur verið teimum ein góður vinur og stuðul, síðan Rani og Aleksandra komu at kennast.

Tróndur leiddi eisini lítlabeiggan, Rana, til Jesus og doypti hann seinni. Tí var tað heilt serligt og rørandi, at tað júst var hann, ið lýsti signingina yvir tey, tá tey valdu at binda knútin endaliga.

Aleksandra og Rani hava búsett seg í Kristiansgøtu í Hoyvík. Aleksandra arbeiðir sum serviceleiðari í Burger King í SMS, og Rani gongur á Føroya Læraraskúla og arbeiðir sum vaktleiðari hjá Pizza67 í Havn. Vit ynskja teimum hjartaliga tillukku.

---



## Bjarni Jøkladal 80 ár

Týsdagin 17. oktober fylti Bjarni Jøkladal 80 ár. Vit eru so heppin í Lívdini at hava tveir Bjarna Jøkladal. Hóast vit halda teir báðar vera tveir unglingar, so er ein hálv øld ímillum teir.

Bjarni er fuglfirðingur. Hann byrjaði sum ungur at læra til jarnsmið á Tórshavnar Skipasmiðju og gjørdi seg lidnan á Blikksmiðjuni hjá Kjølbro á Fornagørðum í Klaksvík. Men nógv ár gingu, til hann aftur fann seg til rættis í høvuðsstaðnum.

Hann búði í Klaksvík til 1968, tá hann flutti til Essostøðina í Kollfjarðardali, sum hann rak í eini 30 ár. Síðan 2002 hava Bjarni og Torbjørg búð í Torkilsgøtu í Hoyvík. Vit ynskja Bjarna tillukku við føðingardegnum.

# Tiltøk

## TILTØK Á BREKKU 3

*(bygningurin aftan fyri MBM)*

Bønarløta fyri ung mikukvøld kl. 18

Undirvísing og bøn týskvøld kl. 20.
*Týskvøldið 14. nov. er einki møti (húsbólkar)*

Ungdómsmøti fríggjakvøld kl. 20.30



*Á Brekku 3*

---

## Lívsdroparnir

er tiltak fyri børn frá 1. til 10. flokk á Brekku 3 í Hoyvík



*Anna Maria og Poula*

**Børn og ung frá 1. til 5. flokk**

kl. 16.45 innskriving
kl. 17.00 vit byrja við at syngja í 30 min.
kl. 17.30 søga ella okkurt evni í 15 min.
kl. 17.45 bólkaarbeiði í 15 min.
kl. 18.00 ymisk verkstøð við handaligum arbeiði (1 tími)
kl. 19.00 tiltakið liðugt

**Børn og ung frá 6. til 10. flokk**

kl. 17.45 innskrivning
kl. 18.00 ymisk verkstøð við handaligum arbeiði (1 tími)
kl. 19.00 byrja við at syngja í 30 min.
kl. 19.30 søga ella okkurt evni í 15 min
kl. 19.45 bólkaarbeiði í 15 min.
kl. 20.00 tiltakið er liðugt

Endamálini við barna- og ungdómsarbeiðinum
eru at vinna børn og ung fyri Kristus.

Eru spurningar, eru tit vælkomin
at seta tykkum í samband við:

Poula Sørensen tel. 310322 / 220429
Anna Maria Anthoniussen tel. 320309 / 228826

### Lívsdroparnir

Vit nýta nógva tíð til at hava tað stuttligt og hugna okkum saman.

Millum annað verður:

- søga
- bólkaarbeiði
- fáa nýggjar vinir
- hava tað stuttligt
- syngja
- leikur
- gera ymiskt handaligt arbeiði

Øll eru hjartaliga vælkomin!
Bjóðið endiliga øðrum við.

# Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla







### Sunnudagin 5. november

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Kvinnan, Bíblian og kristindómurin. Talari: Jógvan Zachariassen. Ung luttaka á familjumøtinum.*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Rómbrævið. Talari: Jógvan Zachariassen*

### Sunnudagin 12. november

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Nicea fundurin ár 325 og guddómleiki Kristusar Talari: Símun Absalonsen. Børn luttaka á familjumøtinum*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Rómbrævið. Talari: Jógvan Zachariassen*

### Sunnudagin 19. november

Eingi møtir. Samfelagsmøtir í Ebenezer.

### Sunnudagin 26. november

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Grundarlagið fyri val av bókum, sum komu í Kanon. Talari: Jens Wang*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Visiónsdagur. Talarar: Leiðslan*

* Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni.

# Kunning og tænastur

### Dreingjabólkur fyri 7., 8. og 9. flokkarnar

Ein dreingjabólkur fyri dreingir úr flokkunum 7., 8. og 9. hittist annað hvørt fríggjakvøld (ólíka viku). Vit møtast kl. 18 til nátturða. Aftaná verður farið í Lívdina á Brekku til ungdómsmøti, sum byrjar kl. 20. Áhugaðir dreingir kunnu seta í samband við Ninu Dalsgaard, tlf. 267733 ella 319245.

### Praktiskar tænastur

Nøkur fólk hava í seinastuni teknað seg til ymisku praktisku liðini, og tað er gott. Men vit høvdu ynskt, at enn fleiri teknaðu seg til liðini, og tí heita vit á fólk um at seta seg í samband við ein av hesum:

- hølini á Brekku – Lív Clementsen (tlf. 516714)
- uppseting – Árant Jacobsen (tlf. 312054)
- køkur – Sunnvá Jacobsen (tlf. 315447)

### Gentubólkur

Fríggjakvøldið tann 27. oktober 2006 byrjaði ein gentubólkur fyri 5. og 6. flokk. Endamálið er, at genturnar læra hvør aðra betur at kenna.



Gentubólkurin bowlar

Ætlanin er, at tær skula møtast heima hjá hvørji aðrari triðja hvørt fríggjakvøld. Foreldrini skipa fyri og hava eisini ábyrgdina av, hvat ið skal henda, tá ið tað er hjá teimum. Tað kann t.d. vera biograftúrur, pizzakvøld, bowling, hugnakvøld heima. Einans hugflogið setur markið.

Tær, ið hava hug at vera við, skula siga frá hjá Heidi Krett Hansen á tlf. 319442/519442 ella við at skriva til krett@kallnet.fo

Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo